


*– Hetta var ein kjansur, sum eg mátti taka av, sigur Atli Gregersen, sum nú fer til Skotlands at spæla fótbólt*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eg má avstað

**FÓTBÓLTUR** – Eg vil ikki koma út fyri, at eg siti í Glitnir um 10 ár og sigi, at eg burdi verið farin avstað, sigur Atli Gregersen, sum nú fer til Skotlands at spæla fótbólt

Eyðun Klakstein

Landsliðsmiðverjin í Víkingi, Atli Gregersen, skiftir um mánaðarskiftið til skotska felagið Ross County Football Club at spæla. Ross County spælir í næstbestu deildini í Skotlandi, og býurin liggur nærindis Inverness. Partarnir hava gjørt ein eitt ára sáttmála.

– Hetta er dreymurin, sum ikki vil doyggja. Eg havi spælt eitt sindur í Danmark, men telir ikki ordilga sum at spæla uttanlands. Mær dámar sera væl bretsku fótbóltsmentanina – hon er, sum eg plagi at siga, »gúppa og rópa kríggj«, sigur Atli Gregersen.

## Altjóða royndir telja

27 ára gamli Atli Gregersen hevur spælt átta landsdystir fyri Føroyar – hann hevur millum annað roynt seg ímóti eitt nú Eysturríki, Serbia og Fraklandi, og hetta vigar nógv hjá skotunum.

Venjarin hjá Ross County Football Club, Derek Adams, leggur stóran dent á týdningin av royndunum hjá Atla Gregersen, serliga tí

**» Eg havi spælt eitt sindur í Danmark, men tað telur ikki ordiliga sum at spæla uttanlands**

at liðið hjá Ross County sum heild er sera ungt, og at hann tí hevur nakrar góðar royndir við í skjáttuni, sum liðið og ungu leikararnir kunnu fáa ágóða av. Eisini verður dentur lagdur á ta fysiski hjáveruna, sum Atli hevur, tá hann er á vøllinum.

## Byrjar 1. juli

Atli Gregersen byrjar í Ross County 1. juli, og hetta komandi árið skal hann so royna seg á høgum stigi í Skotlandi.

– Hetta var ein kjansur, sum eg mátti taka av. Eg vil ikki koma út fyri, at eg siti í Glitnir um 10 ár og sigi, at eg burdi verið farin avstað. Nú fari eg avstað, og so fáa vit at síggja, hvussu tað fer at ganga, sigur Atli Gregersen.

– Tað ræður um at trúgva upp á tað, og er tað nakað, sum eg havi, so er tað trúgv. Hetta verður ein stór avbjóðing og ein uppliving, og fyri okkum sum familju verður tað eisini gott at kunna verða nógv saman, sigur hann.

eydun@sosialurin.fo



# Sjónvarpsskráin til HM

**HM2010** HM-endaspælið í fótbólti byrjar um eina viku. Nakrir føroyingar fara ivaleyst til Suðurafrika, har endaspælið er, og fylgja gongdini á stadion

Tey, sum ikki eru so heppin, mugu taka til takkar við sjónvarpsskýggjanum og til teirra, hava vit savnað eitt yvirlit yvir dystirnar og hvør sjónvarpsrás vísir teir.

Sjónvarpið hjá Kringvarpinum vísir dystirnar, sum TV2 og DR1 vísa.

Her er fyrst skráin til dystirnar í bólkaspælinum.

### Fríggjadagin 11. juni
**BÓLKUR A:**
15.00 Suður Afrika - Meksiko . . . (DR1)
19.30 Uruguay - Frankaríki. . . . . . (TV2)

### Leygardagin 12. juni
**BÓLKUR B:**
12.30 S. Korea - Grikkaland . . (Canal 9)
15.00 Argentina - Nigeria. . . . (Canal 9)
**BÓLKUR C:**
19.30 Ongland - USA . . . . . . . . . . (TV2)

### Sunnudagin 13. juni
**BÓLKUR C:**
12.30 Algeria - Slovenia . . . . . . . . (TV2)
**BÓLKUR D:**
15.00 Serbia - Gana. . . . . . . . . . . . (DR1)
19.30 Týskland - Avstralia . . . (Canal 9)

### Mánadagin 14. juni
**BÓLKUR E:**
12.30 Holland - Danmark . . . . . . . (TV2)
15.00 Japan - Cameroun . . . . . (Canal 9)
**BÓLKUR F:**
19.30 Italia - Paraguay . . . . . . . . .(TV 2)

### Týsdagin 15. juni
**BÓLKUR F:**
12.30 N. Zealand - Slovakia . . (Canal 9)
**BÓLKUR G:**
15.00 Fílabeinsstr. - Portugal . . .(TV 2)
19.30 Brasila - Norður Korea . (Canal 9)

### Mikudagin 16. juni
**BÓLKUR H:**
12:30 Honduras - Kili . . . . . . . . . . (DR1)
15.00 Spania - Sveis . . . . . . . . . . .(TV 2)
**BÓLKUR A:**
19.30 Suðurafrika - Uruguay . . . .(TV 2)

### Hósdagin 17. juni
**BÓLKUR A:**
19.30 Frankaríki - Meksiko . . . . . .(TV 2)
**BÓLKUR B:**
15.00 Grikkaland - Nigeria . . . . . .(TV 2)
12.30 Argentina - S. Korea. . . (Canal 9)

### Fríggjadagin 18. juni
**BÓLKUR C:**
15.00 Slovenia - USA . . . . . . . (Canal 9)
19.30 Ongland - Algeria . . . . . . . . (TV2)
**BÓLKUR D:**
12.30 Týskland - Serbia . . . . . . . .(TV 2)

### Leygardagin 19. juni
**BÓLKUR D:**
15.00 Gana - Avstralia . . . . . . . . . (TV2)
**BÓLKUR E:**
12.30 Holland - Japan . . . . . . . (Canal 9)
19:30 Cameroun - Danmark . . . . . (DR1)

### Sunnudagin 20. juni
**BÓLKUR F:**
12.30 Slovakia - Paraguay . . . . . .(TV 2)
15.00 Italia - New Zealand. . . . . . (DR1)
**BÓLKUR G:**
19.30 Brasila - Fílabeinsstr. . . (Canal 9)

### Mánadagin 21. juni
**BÓLKUR G:**
12.30 Portugal - Norður Korea . .(TV 2)
**BÓLKUR H:**
15.00 Kili - Sveis . . . . . . . . . . . . . . (DR1)
19.30 Spania - Honduras . . . . . . . (TV2)

### Týsdagin 22. juni
**BÓLKUR A:**
15.00 Frankaríki - S. Afrika. . . (Canal 9)
15.00 Meksiko - Uruguay . . . . . . . (TV2)
**BÓLKUR B:**
19.30 Grikkaland - Argentina. (Canal 9)
19.30 Nigeria - Suður Korea. . . . . (TV2)

### Mikudagin 23. juni
**BÓLKUR C:**
15.00 Slovenia - Ongland. . . . (Canal 9)
15.00 USA - Algeria. . . . . . . . . . . . (TV2)
**BÓLKUR D:**
19.30 Avstralia - Serbia . . . . . (Canal 9)
19.30 Gana - Týskland . . . . . . . . . (TV2)

### Hósdagin 24. juni
**BÓLKUR F:**
15.00 Paraguay - N. Zealand . (Canal 9)
15.00 Slovakia - Italia . . . . . . . . . . (TV2)
**BÓLKUR E:**
19:30 Danmark - Japan . . . . . . . . . (DR1)
19.30 Cameroun - Holland . . . . . . (TV2)

### Fríggjadagin 25. juni
**BÓLKUR G:**
15.00 Portugal - Brasila . . . . . . . . (TV2)
15.00 N. Korea - Fílabeinsstr. (Canal 9)
**BÓLKUR H:**
19.30 Sveis - Honduras. . . . . . . . . (TV2)
19:30 Kili - Spania . . . . . . . . . . . . . (DR1)